

# FÍGGJARLEIÐARI / CFO
# TIL ATLANTIC PETROLEUM

**Vilt tú gerast partur av eini børsskrásettari fyritøku, sum virkar í altjóða starvsumhvørvi?**

Atlantic Petroleum søkir eftir fólki at leiða fíggjardeild felagsins. Felagið hevur spennandi menningarmøguleikar fyri framman, og tú fært ein týðandi leiklut í strategisku menning felagsins. Tú verður við í leiðslubólki felagsins og vísir beinleiðis til stjóran.

Fíggjardeildin hevur ábyrgd av øllum fíggjarviðurskiftum. Umframt grundleggjandi uppgávur sum ársroknskapir, kvartalsroknskapir, fíggjarætlanir, fíggjarstýring og frágreiðingar, stendur fíggjardeildin eisini fyri fíggjarviðurskiftum í verkætlanum, sum felagið luttekur í. Deildin hevur eisini um hendi tey krøv, sum áløgd eru felagnum í sambandi við skráseting tess á NASDAQ OMX, umframt at hon stílar fyri samskiftinum við íleggjarar.

**Útbúgving og førleikar**
- > tú hevur hægri útbúgving í búskapi
- > tú hevur hollar royndir við fíggjarstýring, fíggjarætlanum og IFRS roknskaparháttinum
- > tú hevur innlit í viðkomandi lógir og reglugerðir
- > tú dugir væl at samskifta munnliga og skrivliga á enskum
- > tú hevur royndir frá líknandi starvi

**Persónligir eginleikar**
- > tú hevur eitt skipað arbeiðslag
- > tú vísir ábyrgd og hevur dirvi at taka avgerðir
- > tú sýnir virkisfýsni og víðskygni
- > tú dugir at raðfesta og at halda ásettar freistir
- > tú hevur ein jaligan hugburð og ert liðspælari

Til rætta fólkið bjóða vit eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv í eini fyritøku, sum er fyri stórum framburði. Tú fært sera góðar møguleikar fyri bæði fakligari og persónligari menning.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir verða ásettar í mun til royndir og førleikar.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum verða at senda við vanligum brævi til:

Atlantic Petroleum
Postboks 1228
FO 110 Tórshavn

ella við teldubrævi til: sigurdj@petroleum.fo. Gev gætur, at vanlig brøv skulu hava frámerkið "Fíggjarleiðari".

Umsóknarfreistin er 15. desember 2009.

**Meira at vita?**
Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú seta teg í samband við Sigurð í Jákupsstovu á tel. 210280 ella á sigurdj@petroleum.fo.

**Um Atlantic Petroleum**
P/F Atlantic Petroleum er eitt óheft føroyskt oljufelag, sum virkar í einum altjóða umhvørvi í samstarvi við 17 altjóða oljuføg. Felagið hevur ognarpartar í olju- og gassloyvum í Norðsjónum, í eystara parti av írska havinum, í keltiska havinum og á føroyska landgrunninum. Samtakið fevnir um móðurfelagið P/F Atlantic Petroleum, Atlantic Petroleum UK Ltd. og Atlantic Petroleum (Ireland) Ltd. Samanlagt hava vit ognarpartar í 15 loyvum og eiga part í tveimum oljuleiðum í framleiðslu.

Felagið miðar eftir frálandamøguleikum í búnum leitingarøkjum í útnyrðingspartinum av Evropa og á føroyska landgrunninum. Vit stíla eftir eini góðari javnvág millum leiting, útbygging og framleiðslu. Atlantic Petroleum er skrásett á virðisbrævamarknaðunum NASDAQ OMX í Íslandi og í Keypmannahavn.

Høvuðssæti felagsins er í Tórshavn, og felagið hevur skrivstovu í London. Í løtuni starvast 8 fólk í felagnum.

www.sansir.fo

P/F Atlantic Petroleum, Gongin 9, Postboks 1228, 110 Tórshavn, Telefon: 350100, Faks: 350101, www.petroleum.fo

ATLANTIC PETROLEUM




# *Bygningur í Vestmanna til sølu*



- Bygningurin er Inni á Fjørð í Vestmanna
- 2 ferðir 40x20 mtr til støddar
- Hevur 2 skrivstovuhøli
- Kaffistovu og køk
- 2 toilettrúm
- Bygningurin er bjálvaður

Áhugaði kunnu venda sær til Vónina, Hjalmar Petersen á tlf 214392, 474210 ella við telduposti til hjalmar@vonin.com

VÓNIN